# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Evni:** Príshækkingar hjá Bygdaleiðum

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv fara prísirnir hjá Bygdaleiðum at hækka fyri mánaðarkort og vanligan ferðaseðil?
2. Nær fara prísirnir at hækka?
3. Metir landsstýrismaðurin, at hetta er rætta løtan at hækka prísirnar, samstundis sum vit síggja ógvusligar príshækkingar á øðrum økjum?
4. Kunnu viðskiftafólkini vænta, at tænastan verður betri við hægri prísum, t.d. at fleiri túrar verða úr Klaksvík og gjøgnum Eysturoyartunnilin til Havnar?

**Viðmerkingar** :
Norðlýsið visti herfyri at siga, at viðskiftafólkini nú ein dagin skuldu gjalda 100 krónur meir enn higartil fyri eitt mánaðarkort. Ein hækking á heili 10% í einum, sum Strandferðslan tó segði var ein feilur í sambandi við dagføringar av KT-skipanini. Samstundis varð sagt frá SSL, at prísirnir fara at hækka í næstum.

At hækka prísirnar fyri at brúka almennu flutningstólini, samstundis sum vit hava sæð ógvusliga príshækking á býli, olju og matvørum, kann vera steinur oman á byrðu hjá borgaranum. Tí er áhugavert at hoyra, hvat grundgevingin er fyri at hækka prísirnar nú.

Síðan Eysturoyartunnilin kom hava norðoyingar og eysturoyingar ynskt fleiri túrar til Havnar gjøgnum tunnilin. Hetta fyri at fólk, ið ynskja at brúka Bygdaleiðir í hesum økjum, fáa størri gleði av nýggja tunlinum.

Fyri at fáa greiðu á, um hetta er nakað, ið landsstýrismaðurin ætlar sær at gera nakað við, verða hesir spurningar settir.

**Á Løgtingi, 12. september 2022**

Eyðgunn Samuelsen